Tórshavn 15.9.2018

Til

Heina Ellingsgaard

Eftir áheitan frá omanfyri nevnda í samband við bygging av biogassverki:

Vitjað var á staðnum 10. september saman við Heina Ellingsgaard fyri at fáa kunning um verkætlanina og síggja staðið. Eisini hevur verið vitjað á staðnum 14. september fyri at fáa eina mynd av lendinum, har biogasverkið skal vera og av lendinum nærhendis.

Á sjálvum byggiøkinum er ongin orsøk til kanning í samband við lívfrøðiligt margfeldi. Økið er uppgrivið so mikið nýliga, at tað er ógvuliga avmarkað, hvørjar livandi verur hava megnað at staðfesta seg.

Órógvandi vegagerð verður helst ongin, tí vegur er beinleiðis inn á grundøkið.

Lívfrøðiliga margfeldið í haganum rundanum byggiøkið eigur hinvegin at verða skrásett í 2019, so ein vágameting kann gerast.

Økið vestanfyri byggiøkið liggur millum Kallanesskarð og Kaldbaksvegin – fyri endan á vegnum: á Hjalla, Tórshavn. Í høvuðsheitum er tað skiftandi millum gras-, mosa- og mýrilendi. Orsaka av árstíðini ber ikki til at siga nakað um búfugl ella annað livandi á økinum í ár.

Sambært árinmetingum av biogasverkætlanum í Danmark, sí keldu niðanfyri, eiga skrásetingar at verða gjørdar av náttúruni kring biogasverkið og metingar av vandum gjørdar – t.d. útlát, gangur.

Undirritaðu mæla tí til, at uppskot verður gjørt tíðliga komandi vár um lýsing av økinum: Hvørjir vandar kunnu vera fyri náttúruna orsaka av verkinum. Samstundis verður sent tilboð uppá kostnað fyri lýsingina.

Kelda:
https://naturstyrelsen.dk/media/nst/71297/Milj%C3%B8vurdering-af-lokalplan.pdf

Vinarliga

William Simonsen, Blómubrekka 54, FO-100 Tórshavn

Herborg N. Debess, J. Paturssonargøta 37, FO-100 Tórshavn

Olivia Danielsen, Giljavegur 3, FO-420 Hósvík